# Landbúnaðurin bleiv offraður fyri fiskivinnuna

**Føroyski landbúnaðurin er komin verri fyri sum úrslit av føroysku avtaluni við ES, ið gevur føroysku fiskivinnuni sera góðar sømdir. Formaðurin í Bóndafelagnum kallar tað eina offring av einari vinnu til fyrimuns fyri ein aðra. Løgmaður er ikki ósamdur og skilir støðuna hjá landbúnaðinum, men sigur at har var ikki annað at gera um fiskivinnuavtalan skuldi fáast í hús**

ES AVTALA
*Rúnar Reistrup*

Landsstýrið fór til samráðingar við ES um fiskivinnuna, men kom aftur við einari avtalu, sum eisini umfataði landbúnaðin. Hetta hóast einki umboð fyri landbúnaðin var við til samráðingarnar.

Tað kom nevniliga óvæntað á samráðingarnevndina, at ES í síðstu løtu setti fram sum ófrávíkiligt krav í samráðingunum, at landbúnaðurin skuldi vera partur av avtaluni, og tí var landbúnaðurin ikki umboðaður í nevndini.

– Í ES høpi hoyra landbúnaður og fiskivinna óloysiliga saman, og tí bar ikki til at fáa eina avtalu í lag við ES, ið bert umfataði fiskivinnuna. Og á slíkum samráðingunum má man geva út á summum økjum fyri at vinna á øðrum, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við vinnumálum.

## Landbúnaðurin fekk tað súra

Men føroyski landbúnaðurin er av teirri uppfatan, at tað bara er fiskivinnan, sum fær, og landbúnaðurin sum einsamallur missir, tá avtalan við ES eftir ætlan kemur í gildi 1. februar.

Hesum er Anfinn Kallsberg løgmaður, sum hevur uttanlandsmál um hendi, ikki ósamdur í.

– Í slíkum samráðingum má man taka tað súra við tí søta. At tað so er landbúnaðurin sum hevur tikið tað súra er sjálvandi keðiligt, men tað var neyðugt. Høvdu vit noktað fyri at tikið landbúnaðin við í avtaluna, hevði eingin avtala verið, og tað hevði fingið katastrofalar fylgjur fyri fiskivinnuna og harvið føroyska samfelagið sum heild.

## Alskyns dýrasjúkur

Avtalan við ES um heilsufrøðilig viðurskifti, sum varð samtykt í løtinginum seint á vári í fjør, skal eftir ætlan koma í gildi 1. februar. Avtalan er ein rættiligur fongur fyri føroysku fiskivinnuna. Hon inniber at Føroyar kunnu útflyta fisk til ES lond eftir somu treytum sum ES londini flyta fisk ímillum sín, tvs. uttan innflutningseftirlit.

Men fyri at fáa fiskivinnuni hesar sømdir, kravdi ES at avtala somuleiðis skuldi gerast við Føroyar um, at landbúnaðarvørur skuldu kunna flytast millum ES lond og Føroyar uttan innflutningseftirlit.

Men meðan tað er at meta sum góðar sømdir hjá fiskivinnuni at sleppa undan innflutningseftirliti, so hevur hetta heilt aðra merking fyri landbúnaðin. Tað hevur nevniliga við sær, at til ber at flyta livandi dýr til Føroya, uttan at hesi verða kannað ella set í karantenu í Føroyum. Tí stúrir føroyski landbúnaðurin nú fyri, at alskyns sjúkur fara at raka føroysk neyt og seyð, sum higartil hava verið væl vard frá sjúkum, ið eru vanligar í fleiri ES londum.

## Gongur bara annan vegin

Harafturat gongur avtalan við ES bara annan vegin í sambandi við landbúnaðin. Tað fer nevniliga hvørki at bera føroyska landbúnaðinum til at útflyta livandi dýr ella dýraúrdráttir so sum skinn og kjøt til ES londini, hóast hesi kunnu útflyta allar landbúnaðarvørur til Føroya uttan innflutningseftirlit. Orsøkin til hetta er, at eftirlitsverkið í Føroyum ikki enn lúkar treytirnar, sum ES setir.

– Landbúnaðurin er blivin offraður, fyri at fiskivinnan skuldi fáa betri sømdir frá ES. Tað er mikið møguligt at landsstýrið sær hetta sum eitt sera lítið offur í mun til tær sømdir, sum vunnar eru fiskivinnuni, men tað er ein stórur spurningur, um man yvirhøvur kan loyva sær at offra eina vinnugrein fyri eina aðra, sigur Bjørn Patursson, formaður í Bóndafelagnum, sum harðliga hevur mótmælt at landbúnaðurin gjørdist partur av avtaluni við ES.

## Niður yvir høvdið

Formaðurin í Bóndafelagnum er vónsvikin av, at landbúnaðurin ikki varð tikin upp á ráð, tá avtalan varð gjørd. Bóndafelagið bjóðaði sær til at vera við á samráðingunum, men fekk at vita, at samráðingarnar bert fóru at snúgva seg um fiskivinnuna.

Men tað vísti seg seinni, at ES ikki var av somu uppfatan, og úrslitið varð, at avtalan bleiv kroyst niður yvir høvdið á føroyska landbúnaðinum.

Hetta viðurkennir løgmaður, og hann kallar tað óheppið, at landbúnaðurin ikki var umboðaður á samráðingunum. Men hann er ikki í iva um, at samráðingarnevndin gjørdi tað rætta.

– Tað hevur verið eitt áralangt stríð bara at fáa ES so mikið sum at tosa um eina fiskivinnuavtalu. Og hevði hendan avtalan ikki komið upp á pláss, hevði tað merkt, at allur føroyskur fiskur, sum varð útfluttur til ES í framtíðini fór at blíva parkeraður í fleiri dagar á keikantum, áðrenn hann kom á marknaðin. Tað hevði verið einki minni enn ein katastrofa fyri føroyska samfelagið, sigur løgmaður og minnir á at fimmogfýrs prosent av føroyska fiskaútflutninginum fer til ES lond.

– Tá ES ímóti endanum á samráðingunum setti fram sum ófrávíkiligt krav, at landbúnaðurin eisini skuldi ganga undir somu treytir, hevði samráðingarnevndin einki val. Tað var prísurin, sigur løgmaður.

## Smittað dýr góðkend

Nú er tað so upp til landbúnaðin sjálvan at savna stumparnar saman, tá avtalan kemur í gildi 1. februar.

– Fleiri av ES londunum eru nógv meira lagalig viðvíkjandi dýrasjúkum, enn man til dømis er í Danmark. Fleiri av sjúkunum, sum aðrastaðni verða mettar sum heilt vanligar, eru ongantíð staðfestar í Føroyum. Tá so onkur finnur upp á at taka ein veðr til Føroya, til dømis úr Onglandi, eftir 1. februar, so verður veðrurin kannaður av einum djóralækna har, sum sigur gott fyri honum, hóast hann hevur sjúkur, sum ikki finnast í Føroyum. Dýrið er jú fríkst eftir enskum standardi. Tá veðrurin so kemur til Føroya verður hann hvørki kannaður ella settur í karantenu, men sleptur beint í hagan ella trøðna saman við hinum seyðunum. Tá er smittan longu komin til landið, sigur Bjørn Patursson, formaður í Bóndafelagnum.

– So skal bóndin knappliga koppseta 400 seyðir fyri smittuna, og tað er ikki heilt bíligt. Harafturat vita vit heldur einki um, hvussu tær vanligu sjúkurnar aðrastaðni ávirka føroyska seyðin, sigur Bjørn Patursson.

## Vinnan kann sjálv kanna

Nýggj lóg um fyribyrging og niðurberjing av sjúkum hjá dýrum er løgd fyri tingið. Lógin er ein umfatandi liberalisering av galdandi lóg á økinum og er ein fyritreyt fyri, at avtalan við ES kann koma í gildi. Sambært lógini ber ikki til at krevja at innflutt dýr til dømis skulu í karantenu, tá tey koma til landið.

Kortini eggjar løgmaður landbúnaðinum til sjálvum at syrgja soleiðis fyri, at fleiri sjúkur ikki koma inn í landið.

– Eg haldi, at vinnan eigur sjálv at taka stig til at skipa soleiðis fyri, at øll dýr, sum koma til landið, verða kannað og sett í karantenu her. Føroyski landbúnaðurin kundi tikið seg saman um okkurt slag av eftirliti, sum passandi kundi virka eftir nøkunlunda somu reglum sum verandi eftirlit. Einasti munurin hevði so verið, at tað ikki var landið, men vinnan sjálv, sum stóð fyri eftirlitinum, sigur løgmaður.

Men hetta eftirlitið kann tó ongantíð gerast heilt tað sama kortini, tí tað við avtaluni við ES ikki longur ber til við lóg at krevja kanningar av øllum innfluttum dýrum. Hetta má gerast av einslistum í hvørjum føri eftir 1. februar.



*Bjørn Patursson, formaður í Bóndafelagnum, fekk at vita, at føroysku samráðingarnar við ES bert fóru at snúgva seg um fiskivinnu. Men samráðingarnevndin kom heim við eini avtalu, sum tekur burtur alt innflutningseftirlit av dýrum og sostatt loyvir fríum innflutningi av dýrum til Føroya úr ES*



*Føroyskir bøndur óttast fyri at kríatúrini fara at verða smittað av sjúkum, ið eru vanlig í summum ES londum, men ókendar í Føroyum, tá tað í næstum fer at bera til at innflyta dýr úr ES til Føroya uttan innflutningseftirlit*



Býráðsformaðurin í Vági:

# Byggið studentaskúlan við Vágsvatn

**Vágs Kommuna hevur grundøki at vísa á til nýggja studentaskúlan, sum skal byggjast í Suðuroynni. Økið er beint við Vágsvatn og tætt við ítróttarhøllina. Landsstýrið er áhugað í hesum staðnum**

SKÚLABYGGING
*John Johannessen*

Fyri mongum árum síðani var eitt øki vesturi við Vatnið í Vági, sum Jarðarráðið eigur, lagt av til skúlaøki. Hetta økið heldur býráðsformaðurin í Vági vera væl egnað til nýggja studentaskúlan, sum landsstýrið ætlar at byggja í Suðuroynni.

– Økið er sera væl egnað. Tað liggur sera væl fyri í friðarligum umhvørvi nær við ítróttarhøllina og nær við vatnið, vísir Jógvan Krosslág, býráðsformaður í Vági, á.

Hóast stríð áður hevur verið um, hvar studentaskúlin í Suðuroynni skal vera og hóast ein løgtingssamtykt sigur, at hann skal vera í Hovi, verður hann helst bygdur í Vági – og helst verður tað eisini á økinum, sum Vágs Býráð hevur víst á.

Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður í skúlamálum, segði við Sosialin í gjár, at studentaskúlin nú hevur verið í Vági í so mong ár, at tað verður ein stór avgerð, ið skal takast, um hann skal flytast, tí skúlin hevur vunnið sær hevd í Vági.

– Eg vóni ikki, at tað aftur nú verður lokalt rumbul um, hvar skúlin skal vera, tí so verður ætlanin bara seinkað, segði landsstýrismaðurin.

Sosialurin skilir, at landsstýrismaðurin óformelt hevur boðað frá, at hann er áhugaður í økinum við Vágsvatn.



*Vágs kommuna vísir á friðaliga umhvørvi beint við vatnið og nær við ítróttarhøllina í Vági, til nýggja Studentaskúlan*

## Stóran týdning

Býráðsformaðurin í Vági er fegin um orðini hjá Tórbjørn Jacobsen. Hann vísir á, at ein nýggjur studentaskúli kemur at hava stóran týdning fyri býin.

– Ein nýggjur studentaskúli við góðum umstøðum fer at draga ungdómin til at verða verani í Vági, og hann fer eisini at draga vaksin, sum eru fegin um at búgva eitt stað, har ungdómurin trívist og lív er í, sigur Jógvan Krosslág, býráðsformaður.

Jógvan Krosslág heldur tað vera eitt skilagott býti, at landsstýrismaðurin hevur valt, at Almanna- og Heilsuskúlin skal byggjast á Tvøroyri, og at nýggjur studentaskúli skal byggjast í Vági.

– Hetta kemur óivað at skapa nøgdsemi í oynni. Vit koma nú at lyfta oynna í felag, og tað er tað, sum skal til, ger Jógvan Krosslág greitt.

## Byggja leiguíbúðir

Vágs Kommuna ásannar, at tað eisini setir krøv at fáa ein nýggjan studentaskúla á staðnum. Tí arbeiðir kommunan við eini ætlan um at byggja leiguíbúðir til lesandi.

– Vit hava ikki verið í beinleiðis samráðingum við landsstýrið, men vit kundu hugsað okkum at bygt leiguíbúðir afturat skúlanum ella so tætt við skúlan sum gjørligt, sigur Jógvan Krosslág og vísir á, at tað sjálvsagt verður kommunan, ið skal rinda fyri at byggja íbúðirnar.

– Gera vit slíkar íbúðir, lata vit eisini upp fyri møguleikanum fyri, at ungdómar aðrastaðni frá koma higar at nema sær útbúgving, sigur Jógvan Krosslág.

Landsstýrið hevur sett 0,8 milliónir av á fíggjarlógini í ár til at fyrireika nýggjan studentaskúla í Suðuroynni, og innan eina viku fer landsstýrismaðurin í skúlamálum, Tórbjørn Jacobsen, at seta eina bygginevnd.

Formaður Javnaðarfloksins:

# Tjóðveldisflokkurin forðar sjálvstýriskósini

**Jóannes Eidesgaard er sinnaður at samstarva við landsstýrið um at yvirtaka øll málsøki. Men at tosa um fullveldi áðrenn hetta er framt, heldur hann, forðar fyri eini loysn**

SJÁLVSTÝRISÆTLANIN
*John Johannessen*

Javnaðarflokkurin tekur undir við stórum parti av nýggju sjálvstýrisætlanini hjá landsstýrinum. Men hann tekur als ikki undir við, at endamálið við henni er fullveldi.

Hetta ger Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins, greitt, eftir at løgmaður enn einaferð hevur meldað út, at hann fer at royna at fáa Javnaðarflokkin við í nýggju ætlanina hjá landsstýrinum.

Landsstýrið hevur sett sær fyri at fáa eina avtalu í lag við donsku stjórnina, um at løgtingið sjálvt skal fáa heimild at gera av at yvirtaka øll málsøki uttan ríkismál eftir eini ætlan, sum landsstýrið leggur til rættis. Eisini ætlar landsstýrið sær at gera eina avtalu við donsku stjórnina um at niðurlaga blokkstuðulin yvir eitt ávíst áramál.

Tá hetta er gjørt, hevur landsstýrið fingið eina koyriætlan fram móti fullveldinum, og hana skal Føroya fólk taka støðu til á eini fólkaatkvøðu í apríl.

Tá so øll málsøki eru yvirtikin og blokkstuðulin niðurlagaður, skal Føroya fólk aftur til fólkaatkvøðu at taka støðu til eina føroyska grundlóg, sum staðfestir Føroyar sum fullveldisríki.

## Einki verður broytt

Men Jóannes Eidesgaard trýr einki uppá, at hendan ætlan verður framd í verandi valskeiði. Hann vísir á, at hendan nýggja ætlanin, eins og tann fyrra fullveldisætlanin, er borin uppi av dreymum hjá Tjóðveldisflokkinum um fullveldi.

– Tað er komplicerað at yvirtaka. Tað er ikki bara sum at skera í smør. Hetta er yvirtøkan av Skipasýninum gott dømi um. Samgongan hevur arbeitt við at yvirtaka Skipasýnið síðani hon kom til, og enn er ikki komið á mál, sigur Jóannes Eidesgaard.

Formaður Javnaðarfloksins vísir á, at onnur málsøki, sum til dømis løgregla og dómsvald eru upp aftur torførari at yvirtaka, orsakað av mongum lógum og altjóða reglum, sum skulu fáast upp á pláss. Tí fara hesi mál minst at taka somu tíð at yvirtaka, sum skipasýnið. Og tískil er Jóannes Eidesgaard sannførdur um, at ætlanin hjá landsstýrinum ikki fer at halda.

– Tað rætta hevði verið, at samgongan setti sær fyri at fáa eina nýggja skipan við danir, sum gevur løgtinginum fulla heimild at yvirtaka øll málsøki til fult føroyskt ræði uttan ríkismál, tá løgtingið heldur tað vera ráðiligt. Yvirtøkan skal ikki fara fram eftir eini koyriætlan, men tá løgtingið er samt um tað. Og tá øll málsøki eru yvirtikin, kann tann samgongan, sum tá situr, gera av, um vit skulu hava fólkaatkvøðu um fullveldi ella ei, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hendan loysnin er uppskotið hjá Javnaðarflokkinum til eina sjálvstýrislóg í staðin fyri heimastýrislógina.

Formaður Javnaðarfloksins heldur, at landsstýrið beinan vegin, tað varð skipað, skuldi havt sett sær fyri eina slíka skipan. Tí so hevði verið komið nógv longur á sjálvstýrisleið, enn tað higartil hevur eydnast.

– Eg eri bangin fyri, at tá valskeiðið er av, hevur tað ikki eydnast samgonguni at framt nakað mennandi á sjálvstýrisleið, sigur Jóannes Eidesgaard.

## Vantandi heimild

Løgmaður hevur gjørt greitt, at hann ætlar at fáa eina avtalu í lag við danir í hesum mánaðinum, um at broyta heimastýrislógina, so tað eisini stendur løgtinginum frítt at yvirtaka málsøki á lista B í heimastýrislógini. Hesa avtaluna skulu embætisfólk hjá løgmanni fáa í lag.

Men Jóannnes Eidesgaard vísir á, at løgmaður her rennir seg í ein stóran trupulleika.

– Embætisfólkini hjá løgmanni hava sjálvsagt ikki heimild at broyta heimastýrislógina. Tey kunnu í besta føri fáa í lag semju um eitt uppskot, hvussu hon skal broytast, og so má hetta uppskotið viðgerast og samtykkjast bæði á Fólkatingi og í Løgtinginum. Hetta er nakað, sum tekur drúgva tíð, og tí hongur tíðarætlanin hjá løgmanni ikki saman, sigur Jóannes Eidesgaard.

Jóannes Eidesgaard sigur seg hóast alt vera sinnaðan at samráðast við løgmann um eina loysn, men Javnaðarflokkurin stendur fast við ríkisfelagsskapin, ger hann greitt.